DAGSINS MEINING

Valið nærkast

Tað sæst á øllum lótum, at valið nærkast. Nógv brøgd eru at kenna aftur, um man lítir afturum bak og sær søguliga uppá tað.

Øll løgtingsval í Føroyum hava verið hildin áðrenn tíðina síðani 1988. Sjálvstýrisflokkurin má ivaleyst hava rekord í at slíta samgongur, og er hann nú aftur, sum hann plagar, og krevur at fáa sítt fingramerki á fíggjarlógina, um slit ikki skal vera. Tað marghátttliga í hesum málinum er, at flokkurin sjálvur eigur landstýrismannin á økinum, keglast verður um.

Eitt er smaír flokkar, ið hava tann keðiliga óvana at slíta samgongur í seinastu setini áðrenn val, eitt annað eru stórir flokkar, ið eisini hava sínar óvanar uppundir val.

Her hugsa vit um Fólkaflokkin. Fólkaflokkinum dámar væl at disponera yvir landskassanum, serliga í einum valári. Jørgen Niclassen hevði ikki meira enn sett seg í landstýrissessin, áðrenn hann gav nøkrum fáum rækjuskipum skuldarsanering. Við øðrum orðum gjørdi hann nakað, ið er nógvar ferðir verri enn at játta eitt veðhald - hann gav nøkrum fáum reiðaríum skuldarsanering fyri nógvar milliónir uppá skattgjaldarans rokning. Hetta er Fólkaflokkinum so líkt. Teir erpa sær av at hava minkað studning til Vinnulívið í liberalismunar navni, samstundis sum gávuhýrurin aftir øllum at døma ræður í Fiskimálastýrinum.

Okkara dapra forsøgn er, at Fólkaflokkurin fer at fáa nógv burturúr hesum seinasta valskeiði. Vit hava longu sæð ætlaninar um at lata landsjørðina til nakrar fáar, og nú rumbla menn í vikuliga litfaldarnum hjá Fólkaflokkinum um, at okkurt má gerast við rækjuflotan, skal hann ikki verða lagdur á jólum. Hvat er nú hetta? Trúgva fólkaflokksmenn ikki uppá sínar egnu liberalistisku ideologi, har marknaðarkreftirnar klára alt? Fella teir nú aftur í gomlu grøvina, har vinnulívsmenn hálova marknaðarkreftunum og sær sjálvum, tá tað gongur væl, men flokkast um landskassan og geva politikarum skyldina, tá tað gongur illa.

Við undantak av skuldarsaneringini, ið Jørgen Niclassen gav nøkrum fáum rækjutrolarum, so hevur Fólkaflokkurin enn ikki gjarað stórvegis úr landskassanum í hesum valskeiðnum, helst tí tíðirnar hava verið so framúr góðar. Nú tykjast tíðirnar at versna eitt sindur, og so verður Fólkaflokkurin at kenna aftur - vit sóu seinasta Dagblað, og kunnu bert ætast.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Norðstreymoy eigur at venda samgonguni bakið

Ein viðmerking til ein ið kallar seg »vestmenningar«

Hans Pauli Strøm,
javnaðartingmaður

Ein, ið kallar seg "vestmenningar", leggur í Dimmalætting mikudagin eftir teimum báðum tingmonnunum úr bygdini, og heldur at takkað verið teimum báðum eru "norðstreymoyingar ikki nøgdir við gongdina í sínum valdømi – lítið og onki hendir íbúgvunum til frama".

Nú gloymdi hesin hulduvestmenningurin, at norðstreymoyingar eiga ein tingmann aftrat - hann sum bleiv býráðslimur í Havn. Men annars hevur huldumaðurin rætt: norðstreymoyingar hava alla grund at vera ónøgdir við gongdina í hesum valskeiði. Tó skuldi hann verið meira beinrakin í sínum atfinningunum: rætta adressan er teir tríggir flokkarnir í landsstýrissamgonguni í Tinganesi. Við tjóðveldis-, fólkafloks- og sjálvstýrisatkvøðum hava hesir avgjørt at seta Norðstreymoy aftast í røðina alt hetta valskeiðið.

Bergholsætlanin Vestmanna-Við Gjónna-Hvalvík

Hulduvestmenningurin ber ótta fyri, at táið undirsjóartunnilin kemur um Vestmannasund, verður Vestmanna ein blindtarmur og fer at detta burturímillum. Tí heldur hann, at nú skulu vit hava berghol, millum Vestmanna og Við Gjónna og hagani til Hvalvíkar. Tað er eitt gamalt hugskot at binda vestan- og eystanbygdirnar í Norðstreymoy saman á henda hátt og samstundis fáa betri og tryggari samband millum Norður- og Suðurstreymoy. Sjálvt um man heldur valdi at gera alstórar íløgur í vegasambandið, er henda bergholsætlanin í Norðstreymoy framvegis áhugaverd - og skilagóð.

Men tað eru aðrar ætlanir, vit fyrst skulu fremja í Norðstreymoy, áðrenn vit seta hesa gomlu men framvegis skilagóðu bergholsætlanina á skránna. Hon má standa aftan fyri aðrar stórar íløgur, sum Javnaðarflokkurin vil seta í eina menningarætlan fyri Norðstreymoy. Nøkur høvuðsmál í hesum eru:

Menningardepil fyri Fiskaídnað og havbúnað í Vestmanna

Vit vóru nøkur sum løgdu uppskot fram fyri 3 árum síðani um nýggjan Fiskivinnuskúla sum ein Menningardepil fyri havbúnað og fiskaídnað. Javnaðarflokkurin hevur síðani tá roynt at fingið gongd á hesa útbyggingina, men samgongan hevur havt aðrar ætlanir. Nú er so ein arbeiðsbólkur, settur av Mentamálastýrinum, komin til somu niðurstøðu sum vit, um hendan Menningardepilin. Men ikki fáa teir sett spakan í jørðina fyri tær fáu 100-túsund kr., teir seta av á komandi fíggjarlóg.

Tann neyðugi tunnilin til Tjørnuvíkar

Átroðkandi neyðugt er at fara undir at tryggja tað vandamiklu farleiðina til Tjørnuvíkar við bergholið. Hóast Javnaðarflokkurin hevur skotið hetta upp seinastu árini, tí at tað vanliga lapparíið ikki loysir teir afturvendandi trupulleikarnar, hava samgonguflokkarnir ikki tikið undir við ætlanini. Heldur ikki í teirra sonevndu langtíðar íløguætlan er Tjørnuvíkarbergholið tikið upp á tungu.

Trygdardepil við Áir

Tað var um reppið at landsstýrið herfyri fekk gjørt av við Brandskúlan við Áir. Tað eydnaðist at bjarga honum. Nú eiga vit at fara undir næsta stigið: at samskipa allar brand- og trygdarútbúgvingar í landinum og leggja tær í ein nýggjan Trygdardepil við Áir. Samgongan ætlar okkurt annað, og tí verður tað upp til okkara at fremja hesa ætlan í verki.

Ellis- og røktarheim eystanfyri og vestanfyri í Norðstreymoy

Táið landsstýrið kom við lógaruppskotinum um ellis- og røktarheimið í Sundalagnum, fingu vit eina broyting ígjøgnum, so at aðrar kommunur nú kunnu fáa atgongd til somu fígging, nevnliga landið aðra helvtina og kommunurnar hina helvtina av fíggingini, og landið allan raksturin.

Á komandi fíggjarlóg verður peningur settur av til at byrja bygging av ellis- og røktarheimi í Hvalvík-Streymnesi fyri kommunurnar í Sundalagnum (eystaru kommunur í Norðstreymi og nakrar kommunur í Norðureysturoy). Javnaðarflokkurin vil virka fyri at eisini peningur verður settur av á fíggjarlógina til sama endamál, táið Vestmanna- og Kvívíkar bygdarráð vilja fara undir teirra ætlan um eitt ellis- og røktarheim á vestaru síðu í Norðurstreymoy.

Heilsufrøðiligur miðdepil í Kollfjarðardali

Í staðin fyri at troðka neyðugar útbyggingar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ígjøgnum á Debesartrøð, er nógv skilabetri at flyta Starvsstovuna í Kollfjarðardal, har Royndarstøðin er. Har er lagaligt at byggja út, so at har eisini verður rúm fyri fleiri tættum í einum heilsufrøðiligum miðdepli, sum landsdjóralækna, landsapotekara og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Bygningurin á Debesartrøð kann so brúkast til at lætta um bráðfeingistørvin hjá Fróðskaparsetrinum fyri húsarúmd.

Nýggjur eftirskúli í Føroyum ?

Talan er um at stovna nýggjan eftirskúla í Føroyum. Tørvurin hevur verið stórur síðani føroyski eftirskúlin í Genner í Danmark var niðurlagdur. Eitt frálíkt stað at lagt slíkan eftirskúla hevði verið í tí vakra umhvørvinum í Hvalvík-Streymnesi.

Ætlar hulduvestmenningurin í Dimmu og aðrir norðstreymoyingar at nakað skal henda í Norðstreymoy, so er at syrgja fyri at hesir, sum nú ráða fyri borgum, verða settir til viks.

Sosialurin

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Nei, Hans Pauli Strøm, ikki eru vestmenningar huldufólk

Sigvald Zachariasen

At Hans Pauli Strøm leyp úr stólinum í tinginum, tá Páll á Reynatúgvu setti spurnartekin við hansara trúðvirði sum hagfrøðingur, uppímóti trúðvirðinum hjá Høgna Hoydal sum sera víttgangandi loysingarmann, tað skilji eg væl. Tí eg eri eisini av teirri áskoðan, at um ein verður valdur inn á ting, so skal ein ikki fáa slíkt slongt eftir sær, sum tú fekk frá Páll á Reynatúgvu, um tað, at verða hagfrøðingur í einum starvi uttanfyri tingsins gátt. Men at tú kallar tínar bygdarmenn fyri huldufólk, bert tí at teir eru misnøgdir við síni løgtingsumboð, tað er at tola ov líti av, ja tú uppførir teg sum ein erkvisin, stórur smádrongur. Tí sera rætt hava Vestmenningarnir í tí, at vit í Norðstreymoy have ongan lokalan góðan havt hetta valskeið, hvørki eystanfyri ella vestanfyri, sum tú sjálvur, sum nakað nýtt, sundurdeilir Norðstreymoy. Men tað eru vit frá Hósvík og norður til Tjørnuvíkar eftirhondini so von við. Men lat okkum, fólki á eystursíðuni í Norðstreymoy, (sambart H.P.S.) til hetta val standa saman um, at fáa minst eitt umboð inn á ting, tí tað eiga vit at vera før fyri. Og hetta er rættast, at gera í samarbeiði við Sjálvstýrisflokkin, hann liggur eisini politiskt á miðuni. Tí hevur nakar hugsa um okkum í Norðstreymoy í hesum valskeiði, so er tað í øllum førum bara Sjálvstýrisflokkurin. Tí tann flokkurin vildi hjálpa okkum við, at fáa Ellis & Røktarheim til Sundalagi, saman við góðum lokalum kreftum, og hetta hevur flokkurin eisini gjørt, Norðstreymoyingum og Norðeysturoyingum til frama. Tað sum í veruleikanum hendi var tað, at tit við valdir vóru í okkara øki, allir sum ein, rættu ikki so mikið sum ein fingur fyri, at hjálpa, tit heldur arbeiddu ímóti hesi annars frálíku ætlan. Og eitt skulu tit vita, at tað er fólkiðið her býr púra greitt yvir. Teir sum tagdu, teir vita vit hvør í er, men vit vita eisini, at tú H.P.S., beinanvegin roynd at forkoma okkum møguleikan, at røkka hesum málið, við at seta kílar í játtannir til slík heim. Tit fólkavaldu tingmenn í Norðstreymoy, kundu kanska nevnt her í bløðunum, hvussu nógva orku tit løgdu í, fyri at fáa eitt ellis & røktarheim til Sundalagi/Norðstreymoy.

Í tíni grein 06-10-01 í Dimmalætting um hulduvestmenningar lovar tú, at um tú/Javnaðarflokkurin fær umboð á Føroya Løgting fyri hetta øki eftir komandi val, ja so fara tit, at klóra so nógvar pengar til eitt ellis & røktarheim hjá Kvívíkar og Vestmanna komunu sum yvirhøvur tilber. Bert hetta er enn eitt klokkureint tekin uppá, at tit mótarbeiða øllum málum, sum kunnu koma "øllum" Norðstreymoyingum tilgóða, um máli ikki beinleiðis er placera í økinum Vestmanna/ Kollafjørð.

At tú so nú fer so langt, sum at lova fólki norðuri í Haldarsvík og Tjørnuvík, at gera tunnil bygdanna millum, sum annars er hart tiltrongt, skulu bygdirnar ikki doyggja út, tað ger bara trúðvirði hjá bæði tær, og hinum umboðunum uppaftur verri. Á henda hátt samansjóvar tú ikki fólki, men tú sundurskilir øki og fólk, alt sum tað er. Eitt hevur tú so rætt í, og tað er, at tað er hart tiltrongt við einum nýggjum Fiskivinnuskúla í Vestmanna, og tað vil heilt vist Sjálvstýrisflokkurin eisini arbeiða fyri, óansað um tað verður í samgongu ella í andstøðu.

At tað "situr" ein kollfirðingur í tinginum, tað vita vit, og vit vita eisini, at hann bert situr har. Hann bleiv eisini innvaldur í Tórshavnar býráð, og tað er har hann av røttum hoyrir heima. So kunnu vit í sama viðfangi siga Norðstreymoyingum, at líkamikið hvør í Kollafirði kanska skuldi rokki inn á ting eftir komandi løgtingsval, so hendir, fyri okkum tað, at Suðurstreymoyar valdømi fær ein aftrat, og ikki Norðstreymoyingar, vita bara. Og veruleikin er jú eisini tann, at tað vóru ikki norðstreymoyingarið frávaldu Kollafjørð, tað gjørdu kollfirðingar sjálvir, men tað høvdu teir fullan demokratiskan rætt til. Og tí nýtist ikki tær, Hans Pauli Strøm, at reksa upp, hvat skal gerast í Kollafirði. Tað fara tinglimir í Suðurstreymoyar valdømi, saman við býráðspolitikkarum í Havn sjálvir, at syrgja fyri, uttan at spyrja teg, ella nakran annan her í økinum um fyrst.

Viðmerking til Samhald og Eivind málið

Eivind Jacobsen

Við tað at Samhald hevur gjørt viðmerkingar til Sambandspostin, sum ikki eru rættar,loyvi eg mær at koma við nøkrum rættleiðingum.

Fyri tað fyrsta vil eg vísa á, at eg einki hava sæð á prenti í hesum máli, sum ikki er sannleiki. At snara tingum á lukkaðum fundi og alment er ikki altíð líka einfalt!

Samhald meinar, at Eivind ikki er vrakaður sum valevni. Til hetta er at siga, at tá øll onnur meta, at Eivind er upplagt valevni, og bløðini, sum skriva hetta, eru útseld, kann ikki sigast annað enn, at tá Eivind ikki verður biðin at koma á listan av nevndini uttan at hava uppstillingarfund fyrst, eins og gjørt verður í øllum hinum lokaløkjunum í Eysturoynni, má Eivind roknast at verða vrakaður. Alt annað er undanførslur.

Samhald tosar um reglugerð. Sambært lógum hjá Samhald er eingin reglugerð um uppstilling, og tí er alt tos um reglugerð uttanumtos og ósannindi. Men siðvenja hevur verið, at nevndin í praksis einsamøll avger hvørji valevni verða uppstillað. Nevndin skjýtur ein lista upp, sum verður vrakaður ella góðkendur. Teir eru 13 og saman við kandidatum eru teir einsamallur meiriluti, og tí er alt tos um møguleika at stilla upp á uppstillingarfundi teori, sum einki hevur við praksis at gera. At nevndin í Samhald stuðlar sínum kollega er vanlig mannagongd!

Fyri at skera tað út í papp, skal eg siga, at Sofus í Selvindi ikki vildi hava Eivind á listan, og tí er Eivind ikki á listanum. Nakað annað er, at hann heldur ikki heldur nakað um tann, sum er í uppskoti. Besta boð uppá hví, meti eg at verða, at eg ikki dámdi, at Jóhannus Martin Olsen bleiv uppstillaður í 1998. Líknandi megnaði Sofus eisini at gera móti fyrrv. borgarstjóranum á Strondum, sum tá var klárt mest upplagdi kandidaturin á Strondum, hóast fleiri meiningar vóru um tað. Kann nevna, at til tann uppstillingarfundin var eg í sama bili sum Sofus. So kann Sofus ganga runt og vaska hendur, sum hann vil.

Tá tú lýsir til uppstillingarfund á Strondum við uml. 10 tíma freist, er úrslitið avgjørt upp á forhond. Tað vita øll, sum kenna til lokalviðurskiftini á Strondum. Hetta hevur tí einki við demokrati at gera. Tað er lodrøtt lygn og undanførsla, tá sagt verður, at Eivind ikki ynskti at stilla upp.

Tí má staðfestast, at verandi mannagongd hjá Samhald ger tað møguligt hjá einum nevndarlimi at vraka kandidatar, sum honum ikki dámar. Hendan stirvna skipan er eisini orsøkin til mangar ósemjur. Her er jú einki demokrati, og alt verður avgjørt av einari nevnd, sum ongantíð hevur limafundir.

Tað er harmuligt, at nevndin í Samhald ikki skilir og viðurkennir, at teir hava gjørt eina stóra fadesu. Í trongdini at bjarga sær sjálvum, royna teir ymiskt. Men tá tú ert um at drukna, er skilabetri at nærkast landi heldur enn at vassa longur út.

Erkvisnir fullveldismenn

Helgi Abrahamsen

Løgtingsval nærkast, og Høgni Hoydal er aftur farin at spæla rolluna sum tann sakligi maðurin, sum stendur einsamallum mitt í einum meldri av ósakligum politikarum. Meðan hini royna at draga samfelagskjakið niður á eitt ógvuliga lágt støði, so roynir hann hvørja ferð at lyfta tað uppaftur. Í bløðunum nú um dagarnar skrivar hann, at tann støðugt vaksandi útspillingin í politiska orðaskiftinum kann ikki góðtakast.

Men kanska átti Høgni at steðga á eina løtu, og hugsað um úttalilsir hjá sær sjálvum, og egnum partamonnum.

Hvør minnist ikki tá Høgni bað andstøðuflokkarnar velja, um teir vildu vera í parti við føroyingum ella við donsku stjórnini? At vera í parti við føroyingum, var at taka undir við fullveldismálinum, meðan tey sum høvdu eina aðra áskoðan, vóru í "fíggindans parti".

Formaðurin í tingbólki Tjóðveldisfloksins segði tað meira ítøkiliga, tá hann á tingsins røðarapalli kallaði ein andstøðuleiðara fyri landasvíkjara. Men tað hevur Høgni eftir øllum at døma longu gloymt, tí nú skrivar hann soleiðis: *"Tey fara enntá so langt sum at leggja onnur undir at hava ákært tey fyri landasvik o.a. – hóast ongin hevur tikið slíkt uppá tunguna."* Jú stutt er minnið, tá útspillingin vendir tann "rætta" vegin.

Tann 24. august í ár skrivaði ein fyrrverandi skrivari hjá Sjóðveldisflokkinum soleiðis í bløðunum: *"...skjóti eg upp, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin í felag leggja fram lógaruppskot um at øll fullveldisfólk skulu bera eitt frámerki á sýniligum stað (t.d. eina gula stjørnu). Hetta hevði tænt Ríkinum væl at fingið markað hesar samansvornu landasvíkjarar, og hevði eisini lætt um tá teir skulu avrættast.*

Eitt fólk - eitt Ríki!"

So Høgni: Byrja við tær sjálvum og tínum egnu — har er nokk at tríva í.

Arvafíggindar og almenningar í Føroyum!

Hans Birgir Hansen

Eg haldi áfram við at fylgja øllum upp ein hevur skrivað í túsundtals lesarabrøvum, aftan á ein fekk eina nýggja kommunala íbúð, køk, toilettrúm, stovu, í revagarðinum!

Eg kann nú fara at liva og virka undir normalum/náttúrligum/menniskjaligum/moralskum/etiskum lívskorum í eg ikki havi havt í meira enn hálvthundrað ár í Havn!

Eg fari at taka upp aftur sambandi við útlendskar fyritøkur, fáa skipað samskifti/samstarvi/bíleggingar/flutning av peningi/vørum/ og heimaparty av nýggjum!

Eg havi verið íverksetari av nógvum arbeiðum/virksemi/og ein gekk undan at skapa forarbeiði so fleirtjóða fyritøkur komu út á føroyska heimamarknaðin! Eg kann vera nøgdur við at vinna hugsjónarliga/ hugburðarliga/málsliga á arvafíggindum/almenningum/myndugleikum/valdum ið framdu skipaðan terror!

Eg skal hava lagt mítt arbeiðs, familju, frítíðar, privatlív til rættis av nýggjum og fáa rættsforfylgt tykkum, ein ætlar at fáa stevnt fyri dómstólin í Havnini!

Eg kann fyrireika endurgjaldskrøv mótvegis tykkum, ið løgdu fótonglar við atliti til forrætningsvirksemi, tort og sviða tá ein misti livibreyði í Havnini!

Eg fái ikki frið á mær fyrr enn ein klárar upp við tykkum og børn/ungdómar/ ein skal draga til svars, ið høvdu leiklut í skipa terror/ telefonterror!

Eg havi framt íløgur í egnu fyritøku tá ein skapti eitt livibreyð og hevði lýsingar í bløðum/loftmiðlum ein ikki vann inn aftur, tí tit órógvaðu!

Eg vóni, at tit skilja álvara í eins lesarabrøvum í bløðunum, hvørs ein røkir sína samfelagsskyldu, tá ein gevur tykkum mína lívsáskoðanir v.m.!

Eg havi loyst upp fyri ómetaliga nógvum tá ið ein vísti á avlaga/kappingar avlaga virksemi!